# Starvs- og persónsprofilur

Leiðari fyri banaverndartænastuna í Vágum



Juli 2021

# Innihaldsyvirlit

Inngangur ........................................................ 2
Um Barnavendartænastuna í Vágum ........................................................ 2
Starvið sum leiðari fyri barnaverndartænastuna ........................................................ 3
Førleikakrøv ........................................................ 4
Vit bjóða ........................................................ 5
Løn og setanartreytir ........................................................ 5

## Inngangur

Hesin starvs- og persónsprofilur lýsir uppgávur og ábyrgdir í starvinum og krøvini, ið verða sett til førleikar og persónligar eginleikar hjá leiðaranum fyri Barnavernartænastuni í Vágum. Endamálið er at geva eina meira fullfíggjaða mynd av starvinum og tí, sum stýrið fyri barnaverndartænastuni í Vágum væntar sær av leiðaranum.

## Um Barnavendartænastuna í Vágum

Barnaverndartænastan er skipað við støði í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 26. mars 2021.

Endamálið við barnaverndartænastuni er at tryggja, at børn, sum vaksa upp undir viðurskiftum, ið kunnu skaða heilsu teirra og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan rættstundis, og harvið at hjálpa til ein tryggan uppvøkstur.

### Bygnaður

Sørvágs og Vága kommunur reka í felag Barnaverndartænastuna í Vágum.

Barnaverndartænastan er skipað sum sjálvstøðug eind við leiðara, sum hevur ábyrgd av fakligu-, umsitingarligu-, og fíggjarligu leðsluni av barnaverndartænasuni. Leiðarin vísir til formannin í samstarvsnevndini fyri barnaverndartænastuna og hevur í løtuni starvsstað á kommunuskrivstovuni í Vága kommunu.

### Starvsfólk og virksemi

Tilsamans starvast 5 fólk í Banavernartænastuni í Vágum. 52 mál eru virkin í løtuni.

Samstarv er við skúlar, dagstovnar, løgreglu og aðrar viðkomandi aktørar í Vágoynni m.a. gjøgnum SSP-samstarvið, sum Barnaverndartænastan fyrisitur. Tætt samstarv er eisini við Barnaverndarstovu Føroya, sum, umframt at vera karmur um samstarv millum

barnaverndartænastur í Føroyum, eisini ráðgevur í ivamálum og fyrisitur Forsturforeldraskipanina og hagtalsskipan fyri barnaverndarøkið.

## Starvið sum leiðari fyri barnaverndartænastuna

Starvið er tilvísingarliga tvíbýtt: Fakliga mótvegis barnavernarnevndini og rakstrarliga mótvegis samstarvsnevndini í samstarvinum fyri barnaverndartænastuna.

Leiðarin myndar, saman við starvsfólkunum, sosialfakliga og fyrisitingarliga profilin hjá barnaverndartænastuni. Starvið er fulla tíð.

Starvið er býtt í trý ábyrgdarøki:

### ***Faklig leiðsla***

Leiðarin hevur ábyrgd av fakliga og fyrisitingarliga virkseminum hjá barnaverndartænastuni.

Í hesi ábyrgdini liggur m.a. at:

- Støðugt eftirmeta og optimera arbeiðsgongdir og tryggja høga góðsku í arbeiðinum
- Hava ábyrgd av, at lógir og leiðreglur verða fylgdar, góðum fyrisitingarsiði, og av at skjalfesta og tryggja framhald og gjøgnumskygni í málum og avgerðum
- Fylgja við nýggjum fakligum rákum og tryggja, at íblástur uttaneftir verður gagnnýttur og framdur í verki við hóskandi loysnum

- Tryggja, at barnaverndartænastan kann veita barnaverndarnevndini professionella og fakliga nøktandi ráðgeving
- Tryggja at samtyktir hjá barnaverndarnevndini verða framdar til tíðina

- Tryggja, at starvsfólkahópurin virkar sum ein savnað, samskipað og fakliga dygg eind
- Menna barnaverndartænastuna sum eitt gott og virkið arbeiðspláss við týðiligum virðum, greiðum málum og kravi um fakliga dygg úrslit
- Tryggja, at barnavernartænastan er før fyri at veita børnum og foreldrum teirra dygdargóða tænastu, við støði í samstarvi, fyrst og fremst
- Framhaldandi menna tænastur og tilboð hjá barnaverndartænastuni, og samskifta um hesi á ein meiningsgevandi hátt við viðkomandi málbólkar

### ***Starvsfólkaleiðsla***

Leiðarin hevur ábyrgd av starvsfólkunum á Barnaverndartænastuni.

Í starvsfólkaleiðsluni eru uppgávurnar m.a. at:

- Leggja til rættis rekruttering, halda fast við tey góðu starvsfólkini, greina og tilrættarleggja í mun til førleikatørv til framtíðar uppgávur
- Førleikamenna og eggja starvsfólki til at seta mál á sínum øki og gjøgnumføra menningarsamrøður fyri at tryggja menning av førleikum og hóskandi starvsfólkasamanseting
- Leggja til rættis, skipa fyri og góðkenna viðkomandi eftirútbúgvingar og

skeiðvirksemi

- Enda starvsetanir á virðiligan hátt
- Loysa avbjóðingar og skapa loysnir
- Gera arbeiðsætlan, skipa vaktir og leggja avspáking og feriu til rættis

***Rakstur og fígging***
Leiðarin hevur fíggjarliga og fyrisitingarliga ábyrgd av virkseminum hjá Barnaverndartænastuni.

Í hesi ábyrgd liggur m.a. at:

- Tryggja, at fíggjarætlanin fyri økið verður fylgd, og at játtanin heldur. Eru viðurskifti, sum gera, at hetta ikki ber til, so at boða stýrinum fyri samstarvið frá skjótast gjørligt
- Tryggja, at virksemið fylgir fyrisitingarligum mannagongdum og leiðreglum, og at rættartrygdin hjá børnum og foreldrum er í lagi.
- Boða stýrinum frá rakstrar- og umsitingarligum viðurskiftum, sum ikki eru nøktandi ella eiga at verða broytt til tað betra

## Førleikakrøv

***Formligir førleikar***
Leiðarin skal hava sum mest av hesum formligu førleikum:

- Viðkomandi útbúgving innan sosialfakliga økið
- Royndir við fyrisiting, og royndir við leiðslu kunnu vera ein fyrimunur
- Skal kenna og virðismeta viðkomandi lógir á økinum, faklig krøv og standardir
- Skal hava telduførleika á brúkarastøði og evni at seta seg inn í skipanir, ið verða brúktar á økinum

***Persónligir leiðsluførleikar***
Leiðarin skal hava áræði at leiða, ganga undan og verða fyrimynd í menningini og seta sín dám á arbeiðið hjá barnaverndartænastuni. Leiðarin skal harumframt:

- Vera ein góður liðskipari, sum megnar at fremja gott og jaligt samstarv
- Vera jalig/ur, siðilig/ur og støðug/ur og vísa øðrum álit og virðing, eisini tá ið hart leikar á, og støðan gerst torfør
- Vera miðvís/ur, skipað/ur, reflekterandi og megna broytingar

- Hava vitan, áhuga og førleika at seta í gongd og leiða starvfólk og megna at skapa eitt lærandi umhvørvi
- Duga at skapa meining fyri starvsfólkunum, seta út í kortið og fremja sjónliga leiðslu
- Duga at útdelegera uppgávur og fakliga ábyrgd til starvsfólk, motivera og geva feedback.

- Skal verða empatisk/ur í samstarvinum við starvsfólk, børn og foreldur, og samstundis duga at hava neyðuga frástøðu

- Síggja møguleikar, menning og tilfeingi í børnum og familjum teirra og virða teirra lívssøgu og lívsstøðu
- Tryggja opið og mennandi samstarv innanhýsis, við samstarvspartar og umhvørvið barnaverndartænastan virkar í
- Duga at málbera seg skilliga og at fáa boðskapin fram

## Vit bjóða

- Eitt spennandi starv við fakligum avbjóðingum, har tú hvønn dag hevur møguleika at gera mun
- Stóra ávirkan á menningina av tænastum og tilboðum í barnaverndartænastuni í Vágum
- Møguleikar at menna teg fakliga og at mynda barnaverndarøkið í tøttum samstavi við aðrar barnevernartænastur í Føroyum

## Løn og setanartreytir

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum KAF/Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag